## Mentamálaráðið

# Starvsfólk til Próvstovuna

**Starvið**
Eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum málsviðgeri er leyst at søkja á Próvstovuni.

Próvstovan hevur ábyrgdina av at skipa fyri og leggja til rættis próvtøkur í fólkaskúla-, miðnáms- og hægri skúlum.

**Arbeiðið fevnir m.a. um at:**
- Seta uppgávunevndir og samskifta við tær um at gera, prenta og senda út próvtøku-uppgávur til skúlarnar
- Málsviðgera
- Samskipa og fyrireika ymiskar arbeiðsuppgávur á Próvstovuni – innstilling til próvtøku, skemalegging, tekstuppgeving o.a.
- Saman við uppgávunevndum o.ø., gera próvtøkuuppgávur klárar til prentingar, skriva tekstir, gera uppseting (lay-out) o.a.
- Prenta, pakka og senda próvtøkuuppgávur til allar skúlar í skúlaverkinum
- Umsita virkisøki, sum verða løgd til próv-stovuna, t.d. samskifti við próvdómarar o.o.
- Avgreiða samsýning í sambandi við próvtøkur.

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarin hevur:
- Útbúgving og/ella royndir í skrivstovu-yrkinum ella øðrum, ið kann javnmetast við hetta
- Góðan kunnleika í nýtslu av edv, eitt nú word, excel, access, power point, indesign og photo shop.
- Góðan kunnleika til føroyskt
- Góð samstarvsevni
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt og at arbeiða undir tíðartrýsti.

**Vit bjóða**
- Starvið er spennandi við nógvum skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti inn- og úteftir
- Tað er eitt sjálvstøðugt starv við møguleikum fyri bæði persónligari og fakligari menning
- Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum innan undirvísing og mentan.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarflokki 3.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um alt aðalráðið og allar deildir/stovnar tess.

**Umsókn**
Umsókn við prógvum o.ø. skulu sendast til: Mentamálaráðið, Postrúm 3279, 110 Tórshavn, ella sum teldupost til mmr@mmr.fo

**Umsóknarfreist**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 22. desember 2009, kl. 16.00. Starvið verður at seta 1. januar 2010 ella skjótast til ber.

Meira fæst at vita við at ringja til Bjarna Wilhelm, deildarstjóra í Mentamálaráðnum, tlf. 306522 ella 555022.

**Mentamálaráðið** fyrisitur málsøkini útbúgving, gransking og mentan, og herundir eisini dagstovnaøki, kirkjumál og ítrótt. Mentamálaráðið er bygnaðarliga skipað við 4 deildum - fólkaskúladeild, vinnu- og miðnámsskúladeild, mentamáladeild og fyrisitingardeild. **Próvstovan** er partur av fyrisitingardeildini í Mentamálaráðnum.

Tunnils **TILBOÐ** Leygardagin 12/12

**Keyp 2 og gjald fyri 1**
Galdandi fyri allar vørur í handlinum
**Opið er til kl. 17**
SONJA DESIGN
Stoffalág 41 · Tel 314979 · www.sonjadesign.fo



## Høli til leigu á Tvøroyri

Skrivstovu- og handilshøli til leigu á Tvøroyri.

Hølini liggja væl fyrií býnum, við góðum parkeringviðurskiftum.

Nærri fæst at vita á tlf. 37 24 24 ella send teldupost til seta@olivant.fo

**Veitst tú eina góða?**
Ring til Sosialin tlf 341800



QMI www.qmi.dk
**MOTORBEHANDLING**



☑ SPAR brændstof
☑ MINDRE slidtage
☑ STØRRE effekt
Jákup P. Thomsen • Tlf: 22 49 40 ella 52 22 40

DEKKMASTER.FO

**VETRARDEKK**
ContiWinterContact
175/65-14 ..........880,-
185/65-15 ..........950,-
195/65-15 ..........990,-
205/55-16 .......1.290,-

**VETRARHJÓL**
15" felgur við Continental
Einans 6.900,-
Dekkstødd: 195/65-15

16" felgur við Continental
Einans 8.400,-
Dekkstødd: 205/55-16




F D M Testvinnari

www.dekkmaster.fo
info@dekkmaster.fo
telefon 227 000



*Coco leitar eftir nýggjari familju*

Coco er ein Border collie/Lab blanding, hon er 2½ ára gomul, rólig, barnavinarlig.

Hevur tú hug at geva Coco eitt gott heim ring á tlf. 50 45 33.

Vinarliga
Djóraverndarfelagið

www.dvf.fo

DJÓRAVERNDARFELAGIÐ

Lýsing er stuðlað av Sosialinum



**Les Sosialin so ert tú við**